gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Minni blokkur – men meira til almanna-, heilsumál, útbúgving og mentan

**Høgni Hoydal**



Nú vit brúka bert ein triðing av blokkstuðlinum fáa almannamál, heilsa, mentan og útbúgving nógv størri játtanir, enn tá vit brúktu allan blokkstuðulin.

Í 1990 fóru 55% av samlaðu útreiðslunum á fíggjarlógini til almannamál, heilsu, mentan og útbúgving.

Í 2001 fara 64% til hesi endimál.

Samstundis er eitt undirskot uppá 708 mió. vent til yvirskot uppá 600 mió.

Ein sera ótespilig propaganda sæst í bløðunum í løtuni. Serliga eru tað Sosialurin og Dimmalætting, sum í oddagreinum og lesarabrøvum leggja sitandi samgongu undir at raðfesta soleiðis, at okkara sjúku, eldru, veiku og okkara skúlaverk skulu gjalda fyri minkandi blokkstuðul.

Hetta er rætt og slætt ósatt. Hetta eru somu ósannindi, sum tá andstøðuflokkarnir leggja landsstýrið undir at seta vælferðina í vanda í fullveldinum.

Tað er hinvegin gott og kærkomið, at Dagur og Vika seta kikaran á støðuna á eldraøkinum. Neyvan er nøkur familja, ið ikki kennir stóra tørvin á ellis- og røktarøkinum.

Og allir politikarar eiga at vera fullgreiðir um, at nógv er eftir at loysa á almanna- heilsuøkinum og á skúlaøkinum. Men trupulleikarnir eru ikki skaptir nú. Hinvegin er farið undir miðvíst at loysa teir, og raðfestingarnar eru munandi meira sosialar, nú fullveldið verður veruleiki um stutta tíð.

Tað er tí beinleiðis óetiskt, nú nú javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin royna at sláa politiskt platt uppá ta truplu støðu, sum so nógvar familjur eru í. Og at teir royna at geva fullveldinum skyldina og siga meira blokkstuðul verða loysnina, er bara ófatiliga syrgiligt.

| Raðfestingar í Føroyum: | 1990 | 2001 |
|---|---|---|
| Játtan tilsaman | 3.070 mió. kr. 100% | 3.298 mió. kr. 100% |
| Almanna- og heilsumál, Úbúg granskning og me | 1.686 mió. kr. 55% | 2.126 mió. kr. 64% |
| Brúktur blokkst | Allur brúktur + lán | 1/3 brúktur og niðurgoldin |

### »Vælferðin« við donskum blokki

Javnaðarflokkurin sigur, at vit eru »enn ikki komin á 1990-støðið«. Hugsi tað var tá, at samfelagið skuldi fáast í rætt lag eftir 500 døgum. 500 dagar seinni vóru Føroyar farnar á heysin – og vit rinda rokningina enn í dag og mong ár frameftir.

Javnaðarflokkurin sigur, at hann vil velja vælferð fram um loysingina. Men lat okkum hyggja at veruleikanum. Hvussu sá hetta 1990-støðið út, sum javnaðarflokkurin ynskir? Tá vit brúktu allan blokkstuðulin og enntá læntu milliardir afturat at brúka?

### Helvtin av hvørji krónu í 1990

Sum sæst á hjáløgdu talvu, so raðfestu politikararnir í 1990 soleiðis, at knøpp 55% av samlaðu útreiðslunum fóru til almanna-, heilsumál, útbúgving og mentan.

Sama ár brúktu vit 408,5 mió. kr. í beinleiðis rakstrarstudningi til fiskivinnuna. Tað vóru 13,3% av rakstrinum hjá landskassanum – meira enn vit brúktu uppá heilsumál.

Sostatt fór góð helvt av hvørjari krónu, sum Løgtingið játtaði í 1990, til okkara eldru, sjúku, veiku og til mentan og útbúgving fyri øll.

### Tveir triðingar av hvørji krónu í 2001

Í 2001, eftir trý ár við fullveldispolitikki, brúkar landskassin knøpp 64% av samlaðu játtanunum til almannamál, heilsumál, útbúgving og gransking.

Sostatt fara nærum tveir triðingar av hvørjari krónu, sum løgtingið játtar, til okkara eldru, sjúku, veiku og til mentan, útbúgving og gransking.

### Hvar fóru so pengarnir tá?

Í hesum hálovaða blokkstuðulsbúskapinum hjá andstøðuflokkunum fóru pengarnir altso yvirhøvur ikki til almannamál, heilsumál, útbúgving og mentan. Teir fóru til studning, veðhald og annað, sum tilsamans kom at kosta okkum 13 milliardir út gjøgnum vindeygað uppá 10 ár.

### Ein kollvelting

Talan er um eina sanna kollvelting í raðfestingunum á fíggjarlógini. Og sostatt er tað beinleiðis ósatt, tá javnaðarflokkurin sigur, at fullveldissamgongan pínir tey eldru, veiku, sjúku og skúlan niður.

### Støðan er júst øvugt.

Nústaðni fara føroyskir politikarar at raðfesta til eitt føroyskt vælferðarsamfelag. Tí vit taka ábyrgdina av tí. Samhaldsfesti og trygd liggja ikki í einum statskassa, men í okkara egnu virðum og avgerðum.

Vit hava brúkt 3 ár at fáa føroyska búskapin á eina trygga kós til fullveldi, og nú ber til at taka avgerðir og raðfesta tildømis ellis- og røktarheim, serforsorg og annað, sum stórur tørvur er á. Og nú ber til at gera haldgóðar skipanir, ið ikki rapla eftir 500 døgum.

### 1,3 mia. rætta vegin

Tann størsti munurin millum føroyska almenna landshúsarhaldið í dag og fyri tíggju árum síðani, er rakstrarúrslitið.

Føroyski búskapurin er tillagaður 1,3 mia. rætta vegin uppá 10 ár, sum sæst á talvuni yvir úrslitið hjá landskassanum.

| Úrslit: | 1991 | 2001 |
|---|---|---|
| Undirskot/yvirskot | - 708 mió. kr. | + 600 mió. krónur (mett) |

Hetta eiga øll at fegnast um og verða stolt av, tí politikararnir eiga ikki æruna og heldur ikki sitandi samgonga. Heiðurin eiga øll tey sum starvast og trúgva uppá eina framtíð í hesum landi.

### Bøtt, men nógv restar í

Nógv er bøtt, hóast vit enn ikki hava arbeitt okkum úr niðurpíningini undir heima stýrinum.

Vit kunnu tildømis hyggja at játtanunum til Landssjúkrahúsið, til serforsorg (brekað), til eldrarøkt og til fólkapensión.

Hvussu varð raðfest í 1997 eftir at javnaðarflokkurin í samgongu við sambandsflokkin hevði umsitið bæði fíggjarmál og almanna- og heilsumál.? Og hvussu var tað samanborið við 2001 eftir 3-ára fullveldissamgongu.

Økt játtan er ikki vælferð og trivnaður

| Útvald økir við tørvi: | 1997 | 2001 |
|---|---|---|
| *Landssjúkrahúsið:*<br>- rakstur<br>- medicoteknis tól<br>- íløga | 213 mió. kr.<br>0 kr.<br>0 kr. | 233 mió. kr.<br>8 mió. kr.<br>35 mió. kr. |
| Serforsorg (bre | 63 mió. kr. | 77 mió. kr. |
| *Eldrarøkt* | 140 mió. kr. | 185 mió. kr. |
| *Fólkapensión* | 246 mió. kr. | 321 mió. kr. |

Men hesi tølini og støðan á hesum økjum siga okkum eisini, at øktar játtanir eru ikki av sær sjálvum nøkur borgan fyri vælferð ella trivnaði.

Vit mugu gera væl neyvari langtíðarætlanir. Og har eru tað serliga ellis- og røktarheim og íbúðarviðurskiftini hjá brekaðum, ið mugu ovast á dagsskránna – m.a. í samstarvi millum land og kommunur.

Hetta ber nústaðni til at gera nakað veruliga við nú, tí at búskaparpolitikkurin hevur verið so miðvísur.

Vit kunnu nú sum heild fáa trivnað, áræði og nógv størri samstarv at blóma í okkara almanna- og heilsuverki og í okkara útbúgvingum.

### Ábyrgd skapar vælferð

Nú ræður um at halda rimmarfast við fullveldispolitikkin, so alt ikki verður oyðilagt og futtað av eftir 500 døgum. Tí tað er onki fyri. Og so skal aftur skerjast og niðurpínast fyri at fíggja heimastýrið.

Lat okkum halda okkum til veruleikan og ikki til ósanna propagandu frá andstøðuflokkum um, at trupulleikarnir eru skaptir undir fullveldisssamgonguni.

Niðurpíningin fór fram undir heimastýrinum við fullum blokkstuðli og uttanlandslánum – og tað tekur drúgva tíð at byggja haldgóða skipanir upp, samstundis sum vit enn rinda rokningina fyri ábyrgdarloysið. Men nú eru raðfestingarnar greiðar.

# Fyrilestur um norðurlendskar timburkonstruktiónir

TÍÐINDASKRIV
*arkitekturur*

Mikukvøldið tann 27. juni kl 19.30 verður fyrilestur í høllini á landsbókasavninum við norska arkitektinum Anders Haslestad. Heitið á fyrilestrinum er »Nordiske trækonstruktioner og bevaring af dem – kompetanse, teknik og metoder«. Anders Haslestad er ráðgevi hjá norska ríkisantikvarinum. hann hevur í nógv ár arbeitt við varðveiting av gomlum norskum timburbygningum. Anders Haslestad er í Føroyum í sambandi við, at ætlanin er at gera umvælingar á stokkastovuna í Tinganesi. Fyrilesturin vendir sær til arkitektar, verkfrøðingar, byggifrøðingar og handverkarar, og onnur við áhuga fyri evninum. Fyriskiparar eru Føroya Fornminnissavn, Arkitektafelag Føroya, Føroya Verkfrøðingafelag og Føroya Byggifrøðingafelag.

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Vit gleðast um summarið

**Poul Michelsen, fyrrverandi borgarstjóri í Havn, helt røðu á tiltakinum Summarsólstøður, sum var í Sandagerði í Havn fríggjakvøldið:**



*Nógv fólk var til tiltakið Summarsólstøður, sum varð hildið á átjanda sinni*

SUMMARSÓLSTØÐUR
*Poul Michelsen*

Nógvar útleggingar hava verið um, hví hetta tiltakið fyri 17 árum síðan bleiv til - og onkur hevur sagt, at tað ikki er gamal í Føroyum at brenna bál á miðsumri. Hetta er ivaleyst rætt, men tiltakið, sum fyrstu ferð bleiv fyriskipað 1984, hevði rættuliga einfaldt endamál.

Ætlanin var bara at gleðast um summarið og gera hetta í eini tíð, har býarlívið í Havn er samansett av festkløddum pisum, heimafturvendum lesandi, uttanlandsføroyingum og hópin av ferðafólki.

Saman við familju og vinum at leita sær – tá dagarnir eru longstir - til ein hin vakrasta blettin í Havn – Sandagerði.

Eg var tí ikki sørt glaður um at verða biðin at siga nøkur fá orð í samband við árliga tiltakið Summarsólstøður her í Sandagerði – eitt afturvendandi tiltak, sum nú sær út til at eiga sína nátturligu og føstu legu millum ymisku summartiltøkini í Havn.

Í hesum sambandi ein tøkk til býráðið, skótarnar, sangarar og dansarar, sum trúliga øll hesi ár hava sett sín dám á ársins longsta dag.

Bert fá ár frammanundan hesum, var so at siga ongin sandur eftir í Sandagerðið. Sandurin var brúktur sum byggitilfar til m.a. sethúsabygging. Men tá sandur bleiv tikin til at byggja Dr. Alexandrines Hospital gjørdist nøgdirnar so stórar, at so at siga ongin sandur var eftir.

Sandagerði var tí skert bæði sum náttúruøki og øki til frítíðarnýtslu.

At lítil og ongin sandur var eftir hevið eisini við sær, at Sandagerð sum hvalvág ikki var tann besta.

Ynskir vóru tí frá fleiri áhugaðum, um at gera nakað fyri aftur at bøta um hesi viðurskifti.

1985 vóru royndir gjørdar at flyta nakað av sandi við sandbáti út í Sandagerði.

Spenningurin var stórur, um sandurin vildi blíva liggjandi ella um brim og streymur vildi føra hann burtur. Onkur var sannførdur, um at so fór at verða.

Men royndirnar eydnaðist og á fundi 1986 millum grindaformenninar og kommunurnar, sum vara av grindaøkinum í Suðurstreymi, varð samtykt at fáa væl meira av sandi flutt til Sandgerði og at útreiðslurnar skuldu býtast millum kommununar í grindaøkinum eftir fólkatali – Sum sagt so gjørt.

Til gleði fyri allar partar – ikki minst fyri Sverra Dahl, sála – sum av góðum grundum hevði hetta plássið serliga tætt at sær – eydnaðist við mannahond aftur at skapa ein hin náttúruvakrasta blettin í Havn, og sum so at siga øll - smá sum stór - hava ein kerligan tokka til.

Sandagerði er tí í dag ein hin mest brúkti frítíðarstaður hjá Havnarborgarum og er sum hvalvág eisini væl nýtilig.

Tokkan til Føroyar og Havnina hava fólk gjøgnum tíðirnar lýst bæði í skrift og talu.

Ofta vísir tað seg, at tokkin og virðingin fyri landið okkara – og tað vælsignilsi tað er, at eiga rættin at búgva í Føroyum - er sterkast, tá fráleikin úr Føroyum er størstur.

Komi í hesum sambandi at hugsa um Jørgen Frantz Jacobsen har hann í bókini »Det dyrebare liv« ella umsett til føroyskt »Dýrmæta lív« í sínum samskifti við William Heinesen í ymiskum sinnalag, lýsir sína støðu og sín longsul eftir heimliga umhvørvinum í Havn.

Jørgen Frantz hevur eins og nógvir aðrir havnardreingir haft síni sterku barnaupplivilsir her, og m.a. tá hann fyrstu ferð er staddur her við Sandá og Sandagerði. Sandagerði kemur hereftir at standa við Niagara demensjónum rist í barnaminni hansara.

Jørgen Frantz er staddur í Danmark. Hann stríðist við ólekuligu sjúku sína, alt meðan hann roynir at fáa bókina um Barbaru lidna.

Jørgen Frantz ferðast í huganum í kendum umhvørvi – hann lýsir m.a. áirnar í Havn. Sandá, áin úti í Horni, Rættará og so Hoydalsá.

Tað ógloymandi løtu tá hann fyrstu ferð stóð andlit til andlit við risastóru Sandá. Eitt drama í náttúruni, ein ómetaligur brúsandi áarstreymur undir stásiligu brúnni og við grótfjallinum Kirkjubøreyni – í bakgrundini.

Og Jørgen Frantz heldur fram:

Fossurin í Sandagerði var eitt ómetaligt náttúrufyribrigdi. Longu langt áðrenn tú sást fossin kundu tú hoyra máttmiklu rødd hansara. Á høvdini – har hospitalið liggur – hómaðist fossurin – ein av mínum fyrstu og grundleggjandi náttúrumyndum. Ein av lívsins fyrstu friðsælum. Í roynd og veru, havi eg ongantíð funni eitt stað, sum var deiligari enn Sandgerði.

Jørgen Frantz ferðast niðan gjøgnum ánna og gevst ikki, fyrr enn hann hevur funni sjálvan upprunan til ánna - keldunar uppá á Húsareyni.

Ein lýsing og ein kærleiksjáttan til henda stað og hetta land.

Jørgen Frantz játtar sín kærleika til heimliga umhvørvið og fólki, sum har býr – finnur sálarfriðin vitandi um, at hann sleppur heim og aftur sleppur at hvíla millum áirnar í Havn.

Jøren Frantz lýsir – í bókini Dýrmæta lív – flest øll kend støð í Havn. Nógv av hesum hava í tíðarbilum verið hótt av mannahond. Men takkað verið áhuga frá ymiskum síðum – frá Býráðnum og ikki minst frá vanligu borgarunum í Havn, er bøtt munandi um nógv av hesum.

Men okkurt er enn eftir at gera – og skal vón mín vera, at skipað verður soleiðis fyri, at samskifti og upplivilsi - eitt barn/ein unglingi í Havn í dag hevur í býarsamfelagnum og annars samfelagnum yvirhøvur - verður so ríkt, at hetta kann gerðast ein tíðandi íblástur á lívsins leið.

Takk fyri.



*Poul Michelsen, sum var borgarstjóri í Havn frá 1981 til 1992, helt røðuna í Sandágerði fríggjakvøldið*